Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

c/o Fígging Landsins, Gjaldstovan, Kvíggjartún 1, FO-160 Argir

P/F-Skrás.nr.:

## Ársfrásøgn

## 2015

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann / .

______________________________

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2015** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 10 |
| Fíggjarstøða | 11 |
| Notur | 13 |

## Leiðsluátekning

Stýrið hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2015 hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við góðan roknskaparsið og sambært § 13-15 í stýrisskipan fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin..

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2015 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2015.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

"Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning".

Argir, tann 17. mai 2016

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Anfinn V. Hansen<br>formaður | Marita Rasmussen | Georg Hansen |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigaran í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin**

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2015 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir góðun roknskaparsiði og sambært § 13-15 í stýrisskipan fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2015 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2015 samsvarandi góðun roknskaparsiði og sambært § 13-15 í stýrisskipan fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Sum ásett í ársroknskaparlógini hava vit lisið leiðslufrágreiðingina. Annað er ikki gjørt hesum viðvíkjandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Við støði í hesum er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 17. mai 2016

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Fróði Sivertsen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin<br>c/o Fígging Landsins, Gjaldstovan<br>Kvíggjartún 1<br>FO-160 Argir |
| | Telefon: 352400<br>Telefaks: 352401 |
| | P/F-skrás.nr.:<br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember<br>24. roknskaparár |
| **Nevnd** | Anfinn V. Hansen, formaður<br>Marita Rasmussen<br>Georg Hansen |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Hoyvíksvegur 5, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo |

# Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn. Fæ grunsins verður fingið til vega við, at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum 1,75 % av teirra árligu skattskyldugu inntøku, og allir arbeiðsgevarar rinda 1,75 % av útgoldnum A-inntøkunum. Frá 2016 er gjaldið broytt til 2,25% á bæði arbeiðsgevara- og løntakara síðu.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997. Við broytingini hevur persónurin rætt til eftirløn, tá hann hevur fylt 67 ár, annahvørt hann býr í Føroyum ella uttanlands.

**Fíggjarlig lýsing**

Inntøkurnar til AMEG vóru 304 mió.kr. í 2015, 17 mió.kr. hægri samanborið við 2014. Útgjøldini í 2015 vóru nærum 268 mió.kr., umleið 15 mió.kr. hægri enn fyri 2014.

Annar kostnaður og starvsfólkakostnaður vóru í 2015 3,7 mió.kr. og eru t.kr. 400 lægri enn undanfarna ár.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar gjørdist í 2015 eitt avlop uppá t.kr. 32.307 (2014: 30.718). Ársúrslitið í 2015 gjørdist eitt avlop á t.kr. 70.584 (2014: t.kr. 80.341). Høvuðsorsøkin til lægra úrslitið í 2015 samanborið við 2014 er eitt verri fíggjarligt avkast. Avkastið í 2015 var 3,5%, meðan tað var 4,7% í 2014.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 2015 t.kr. 1.209.223 (2014: t.kr. 1.138.202).

Útgjaldið til einstaka pensjónistin við fullari pensjón var 3.010 kr. um mánaðin í 2015 ella 36.120 kr. fyri alt árið. Fyri 2016 er útgjaldið hækkað við 29,9% og er 3.910 kr. um mánaðin ella 46.920 kr. um árið. Orsøkin til lutfalsligu høgu hækkingina er, at inngjøldini til grunnin frá bæði løntakarum og arbeiðsgevarum er hækkað úr 1,75% til 2,25%.

**Framtíðin**

Mánaðarliga upphæddin í arbeiðsmarknaðar eftirløn í 2015 var kr. 3.010. Fyri 2016 er útgjaldið kr. 3.910 um mánaðin. Búskapargongdin í Føroyum hevur stóra ávirkan í inngjøldini til grunnin, og eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum hevur ávirkan á útgjaldingina.

Fyrstu fýra mánaðirnar av 2016 eru renturnar lækkaðar og rentumunurin millum stat og realkredit er minkaður aftur. Tað ger, at avkastið av lánsbrøvum hevur hesa tíðina givið eitt gott íkast til samlaða avkastið.

Kursurin á partabrøvum fall munandi í januar og februar, men hevur rættað seg nakað aftur, tó ikki nóg mikið til at náa einum positivum avkasti av hesum parti av íløgunum.

Enn er ilt at meta um avkast fyri alt árið, men vit rokna við at røkka einum rímiligum avkasti, hóast misjøvnu fyrstu mánaðirnar av árinum.

**Hendingar eftir roknskaparlok**

Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársfrásøgnini.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er gjørd í samsvari við góðan roknskaparsið og sambært § 13-15 í stýrisskipanini fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**

Inntøka grunsins – arbeiðseftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1,75% av árligu skattskyldugu inntøkuni sambært fyribilsskattaskránni, umframt reguleringar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari støðd, at tær hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

Fyri arbeiðsgevarar er eftirlønargjaldið gjørt upp sum 1,75% av árliga útgoldnu A-inntøkuni.

**Kostnaður av arbeiðsmarknaðareftirløn**

Kostnaðurin fyri arbeiðsmarknaðareftirløn er lógarbundna útgjaldingin til pensjónistar í roknskaparárinum.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til fyrisiting, útreiðslur til umsiting av ognum grunsins, umframt annan kostnað.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

## Nýttur roknskaparháttur

**Fíggjarstøða**

### Áogn

Áogn frá sølu og tænastuveitingum verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárinum.

**Virðisbrøv og kapitalpartar**

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað undir ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (virðisbrævamarknaðarkurs) við roknskaparlok.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

**Skuld**

Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld v.m., verða tiknar við til amortiserað útveganarvirðið, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2015<br>kr. | 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Nettoinntøka | 303.734.209 | 287.469 |
| 2 | Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | -267.755.179 | -252.658 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -3.488.261 | -3.907 |
| | **Bruttoúrslit** | **32.490.769** | **30.904** |
| 3 | Starvsfólkakostnaðir | -183.587 | -186 |
| | **Rakstrarúrslit** | **32.307.182** | **30.718** |
| 4 | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 38.301.475 | 49.649 |
| 5 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -24.959 | -26 |
| | **Ársúrslit** | **70.583.698** | **80.341** |

**Uppskot til býti av ársúrsliti:**

| | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 70.583.698 | 80.341 |
| **Býtt tilsamans** | **70.583.698** | **80.341** |

# Fíggjarstøða 31. desember

## OGN

| Nota | | 2015 kr. | 2014 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 41.548.063 | 25.192 |
| | Tíðaravmarkingar | 29.616.060 | 27.660 |
| | Áogn tilsamans | 71.164.123 | 52.852 |
| 6 | Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | 1.117.534.236 | 1.057.250 |
| | Virðisbrøv tilsamans | 1.117.534.236 | 1.057.250 |
| | Tøkur peningur | 20.525.123 | 29.066 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **1.209.223.482** | **1.139.168** |
| | **OGN TILSAMANS** | **1.209.223.482** | **1.139.168** |

## SKYLDUR

| Nota | | 2015 kr. | 2014 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 7 | Flutt úrslit | 1.208.786.191 | 1.138.202 |
| | **Eginogn tilsamans** | **1.208.786.191** | **1.138.202** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 437.291 | 950 |
| | Onnur skuld | 0 | 16 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 437.291 | 966 |
| | **Skuld tilsamans** | **437.291** | **966** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.209.223.482** | **1.139.168** |

8 **Veðsetingar og trygdarveitingar**

9 **Eventualskyldur**

## Notur

| | 2015 kr. | 2014 t.kr. |
|---|---|---|
| **1. Nettoinntøka** | | |
| Eftirlønargjøld, løntakarar | 162.115.865 | 153.796 |
| Eftirlønargjøld, arbeiðsgevarar | 141.618.344 | 133.673 |
| | **303.734.209** | **287.469** |
| **2. Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn** | | |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | 267.755.179 | 252.658 |
| | **267.755.179** | **252.658** |
| **3. Starvsfólkakostnaðir** | | |
| Lønir | 180.131 | 182 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 3.456 | 4 |
| | **183.587** | **186** |
| **4. Aðrar fíggjarligar inntøkur** | | |
| Avkast, lánsbrøv | 11.111 | 20.088 |
| Avkast, partabrøv | 36.973.846 | 28.384 |
| Rentur, peningastovnar | 51.459 | 99 |
| Rentur, áogn frá sølu | 241.394 | 138 |
| Røktarkostnaðir minus refusiónir | 1.023.665 | 940 |
| | **38.301.475** | **49.649** |
| **5. Aðrir fíggjarligir kostnaðir** | | |
| Aðrir handilskostnaðir | 24.959 | 26 |
| | **24.959** | **26** |

| | 31/12 2015<br>kr. | 31/12 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|

**6. Onnur virðisbrøv og kapitalpartar**

| | | |
|---|---|---|
| Lánsbrøv | 949.584.689 | 883.641 |
| Partabrøv | 167.949.547 | 173.609 |
| | **1.117.534.236** | **1.057.250** |

**7. Flutt úrslit**

| | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit primo | 1.138.202.493 | 1.057.861 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 70.583.698 | 80.341 |
| | **1.208.786.191** | **1.138.202** |

**8. Veðsetingar og trygdarveitingar**

Ongar ognir hjá grunninum eru veðsettar, og ongar trygdir eru veittar.

**9. Eventualskyldur**

Ongar aðrar skyldur hvíla á grunninum.